# Fyrstu tímarnir til arbeiðis

**- Hetta tekur sína tíð, men eg meti tað vera alneyðugt at hitta hvørt einstakt av teimum mongu starvsfólkunum í býráðnum, sigur Heðin Mortensen**

BÝRÁÐIÐ
*Snorri Brend*

Nýggi borgarstjórin hevði ein strævnan fyrrapart í gjár: Hann møtti til arbeiðis kl. 8, og brúkti meginpartin av fyrrapartinum at tosa við starvsfólk á leiðini.

Tá vit tosaðu við hann kl. 11:30 var hann komin hálva leið við at hitta starvsfólk í sjálvari umsitingini. Hann hevur sett kortini sær sum mál at hitta øll tey umleið 1000 starvsfólkini, sum eru knýtt at kommununi á einhvønn hátt.

### Starvsfólkini fylgja væl við

Fyrst á skránni í gjáramorgunin var at seta seg inn í ta nýggju skrivstovuna við tí vakra útsýninum móti Vaglinum. Har var tó fólk inni so at siga alla tíðina, tí ein nýggj telda skuldi installerast og setast á skrivaraborð hansara.

Hann hevði kortini ikki langa tíð til at njóta útsýnið, tí hann skuldi fyrireika seg til ein fund við allar deildarleiðararnar í kommununi. Hesin fundurin byrjaði kl. 9, og har legði hann fram ætlanirnar hjá nýggju býráðssamgonguni.

Eftir fundin byrjaði hann so runduna at heilsa uppá øll starvsfólkini. Hann gav sær góða tíð til tað, og ynskti ikki alt bara hendi í skundi.

- Vit skulu jú samstarva í framtíðini, og tí er eingin orsøk at renna avstað.Starvsfólkini eru øll spent uppá arbeiðið hjá nýggju samgonguni og hvørjar ætlanir hon hevur í framtíðini. Hetta er jú eisini teirra arbeiðspláss, og tí fylgja tey eisini sera væl við í tí, sum politikkarnir takast við, sigur Heðin Mortensen.

Eitt tað næsta stóra arbeiðið verður at fyrireika komandi býráðsfund, sum er ásettur seinast í mánaðinum. Hann væntar tó, at kallað verður inn til eina eykabýráðsfund fyrri enn tað, tí at nøkur mál hava skund og onkur týdningarmikil nevnd skal veljast tá.

- Alt tí alt hevur hetta verið ein hugnaligur fyrrapartur í mínum nýggja starvi, staðfestir Heðin, - áðrenn tann næsta starvsfólkið kom á hansara leið fyri at heilsa uppá hann.

# Útjaðarin skal mennast

Hóast teir flestu borgararnir búgva í Havn, so ætlar nýggja býráðið ikki at tær smærru kommunurnar skulu gloymast. Hesar skulu eisini fáa sín lut í menningini av størstu kommununi í landinum, og tí eru eisini lagdar ítøkiligar ætlanir fyri hesi økini.

Í Kollafirði er ætlanin at gera havnaøkið á Oyrareingjum klárt og gera eina atløgubryggju. Á Langasandi verða báðar atløgubryggjurnar knýttar saman.

Nógv hevur verið tosað um havnina á Sundi, har ein ætlan um neystabygging var frammi, men sum ikki fekk politiska undirtøku. Nýggja býráðið ætlar tí sum skjótast at taka upp spurningin um havnina á Sundi, og út frá hesum avgera um henda í framtíðini skal gerast fríhavn.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við havnalagnum í Nólsoy, og har hevur kommunan eisini aðrar ætlanir, sum verða til gagns fyri tann einastaka nólsoyingin, og sum fer at skapa tirvna í bygdini.

Í Nólsoy og Hesti hevur verið lýst eftir tekniskum hjálparfólkum, sum skulu virka sum eitt slag av húsavørðum í bygdunum.

Hesi teknisku hjálparfólkini, sum væntandi verða sett í starv seinni í hesum mánaðinum, skulu m.a. hava umsjón og viðlíkahald fyri vatnleiðingunum, gøtuljósum, vegum, kloakkum, kommunalum bygningum og havnaøkinum.

Annars fáa allar bygdir í stórkommununi hvør sína lokalu nevnd, har býráðið, sambært Heðini Mortensen fer at geva teirra arbeiði størstan ans. Býráðið hevur sjálvt valt síni umboð í hesar nevndirnar, meðan borgararnir sjálvir velja hini umboðini.

# Havnin – ein kommuna f

**Allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu fáa ágóðan av arbeiðinum hjá nýggju býráðssamgonguni í høvuðsstaðnum. Og so er líkamikið um tey búgva í nær ella langt burtur frá Vaglinum í Havn.**

BÝRÁÐSARBEIÐIÐ
*Snorri Brend*



Tíðliga gjáramorgunin fór Heðin Mortensen frá húsum og helt leiðina oman í Býráðshúsini á Vaglinum,

Hetta hevur hann gjørt so mangar ferðir áður hesi seinastu 32 árini, men hesa ferð var tó ein broyting: Áður hevur hann mangan stigið inn um hesar dyr sum býráðslimur, men í gjár var tað sum tann 18. borgarstjórin í landsins størstu kommunu.

Sum leiðari av samgonguni millum Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin skal hann tey komandi fýra árini hava ábyrgd fyri at málini í avtaluni teirra millum verða førd út í lívið.

Og tað eru ikki hissini mál, sum nýggja býráðssamgongan hevur sett sær fyri.

- Okkara hægsta ynski er at røkja áhugamálini hjá øllum borgarunum í kommununi – og so er líkamikið um teir búgva í Havn, Hvítanesi, Hesti ella hinum bygdunum. Ja, vit kenna tað sum okkara skyldu at gera hetta, sigur Heðin Mortensen í samrøðu við Sosialin.

Frá nýggjárinum er Havnin vorðin enn størri, tí Kirkjubøar, Nólsoyar og Hests kommunur eru farnar í søguna, nú tær eru vorðnar partur av Tórshavnar kommunu.

Á skrivstovu síni á Vaglinum í Havn hevur Heðin Mortensen eitt gott útsýni yvir Vaglið. Her skulu ætlanirnar samskipast og førast út í lívið, til gagns fyri allar teir 19.000 borgararnar í høvuðsstaðarkommununi.

### Vinnan fær góð kor

Tey seinastu árini eru stórur útbyggingar farnar fram í høvuðsstaðnum, og tað arbeiðið er ætlanin at halda fram við. Ætlanin er kortini ikki at leypa framav, tí í avtaluni millum flokkarnar verður týðiliga og greitt sagt, at førast skal eina varligur og ábyrgdarfullur fíggjarpolitikkur.

- Hóast alt hetta, so er okkara hægsta ynski at seta trivnaðin hjá tí einstaka borgaranum í hásætið, sigur Heðin Mortensen.

Ein av stóru málunum hjá nýggju samgonguni er at geva vinnuni góðar umstøður og kor. Við hesum er endamálið at skapa góðar karmar fyri nýggjum virksemi og nýggjum vinnum.

Ætlanin er at seta eina nevnd at taka sær av øllum málum, sum hava við menning av vinnuni at gera. Samstundis skal ein menningarleiðari fylgja við gongdini og skal ráðgeva býráðnum í hesum sambandi.

### Allir aldursbólkar

Er nógv gjørt fyri at menna og útbyggja høvuðsstaðin upp til henda dag, so er ikki ætlanin at slaka í hesum arbeiði í framtíðini.

Í avtaluni millum flokkarnar verður sligið fast, at eftir útbyggingina av Hoyvíkar skúla stendur Argja skúli næstur á listanum. Ein námsfrøðilig menningarætlan skal gerast fyri barnaansingina, og fyri barnafamiljurnar verður helst eisini sæð fram til at ein avsláttur fyri systkin verður settur í verk.

Kropsvenjing og ítróttur hava eisini stóran áhuga hjá nýggju samgonguni, og tí fer kommunan framvegis at stuðla mennandi virksemi innan ítrótt og frítíðarvirksemi. Og ætlanin er haraftrat at menna ítróttin soleiðis at Oyggjaleikir aftur kunnu haldast her á landi.

# Allar býráðsnevn

**Á fyrsta fundinum hjá nýggja býráðnum í Havn, sum var hóskvøldið, vórðu allar trettan nevndirnar mannaðar. Talan er um tær vanligu sjey býráðsnevndirnar og seks økis- ella bygdanevndir**

Boðað varð frá tveimum valbólkum á býráðsfundinum í Havn í gjár. Samgongan við sjey býráðslimum, Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov úr Javnaðarflokkinum og Jógvan Arge, Leivi Hansen, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrinu Frýdal úr Tjóðveldisflokkinum. Hin valbólkurin var andstøðan, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin við Jan Christiansen, Sjúrði Olsen, Bjarta Moht og Anniku Olsen úr Fólkaflokkinum og Betae L. Samuelsen og Høgna Mikkelsen úr Sambandsflokkinum.

Hetta býtið í býráðnum ger, at samgongan fær tríggjar limir í allar fimmmannanevndir, meðan andstøðan fær hinar báðar.

Soleiðis eru tær trettan nevndirnar mannaðar tey næstu 4 árini:

**Fíggjarnevndin:**
Heðin Mortensen, formaður
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Jan Christiansen
Høgni Mikkelsen

**Sosiala nevnd:**
Katrin Dahl Jakobsen, formaður
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Jan Christiansen
Beate L. Samuelsen

**Mentamálanevndin:**
Hildur Eyðunsdóttir, formaður
Katrin Dahl Jakobsen
Jógvan Arge
Annika Olsen
Beate L. Samuelsen

**Tekniska nevnd:**
Marin Katrina Frýdal, formaður
Katrin Dahl Jakobsen
Leivur Hansen